## United áhugað í Huntelaar

Hollendski álopsspælarin Klas-Jan Huntelaar avdúkar nú ein loynidóm, sum ikki hevur verið serliga væl goymdur. Hann viðurkennur, at enska felagið Manchester United hevur sýnt honum stóran áhuga. - Eg veit, at ávís ensk feløg fylgja mær, til dømis er Manchester United sera áhugað í mær, sigur Klas-Jan Huntelaar sambært Skysports. Huntelaar spæl fyri hollendska stórfelagið Ajax úr Amsterdam.




## Gravesen venur við eykaliðnum

Fyrrverandi danski landsliðsspælarin Thomas Gravesen hevur sáttmála við skotska felagið Celtic, men har eru tey ikki serliga áhugað í danska spælaranum longur. Farna kappingarár var Gravesen leigaður til enska felagið Everton, og nú hann er komin aftur til Celtic at spæla, hevur venjarin givið honum boð um at venja við eykaliðnum. Hetta verður mett sum eitt greitt tekin um, at felagið vil av við danska spælaran.

# Mátti taka menninar av vøllinum

**Allan Mørkøre, sum er venjari hjá AB, sigur seg ikki hava upplivað slíkt kortspæl, sum hann gjørdi í Leirvík leygardagin, tá AB spældi móti Víkingi**



*Talan var kanska um kortmet í einstakum dysti, tá Rúni Gaardbo dømdi 1. deildardystin millum Víking og AB leygardagin*

*Savnsmynd*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vakti ans, tá dómarin í Leirvík, Rúni Gaardbo, brúkti kortini ikki færri enn 17 ferðir í dystinum millum Víking og AB. Sjey spælarar á hvørjum liði fingu gult kort, umframt at tríggir spælarar vórðu riknir av vøllinum eftir gula kort nummar tvey.

- Eg havi spælt fótbólt í 20 ár, men eg havi ongan tíð áður upplivað eitt slíkt regn av kortum, sigur Allan Mørkøre, sum er venjari hjá AB.

Uttan at vilja gera viðmerkingar til sjálva dømingina, so heldur Allan, at talan avgjørt ikki var um nakran hart spældan dyst.

- Tað var tað ikki. Men sum venjari má eg siga, at tíbetur vóru vit á odda og við 11 móti 9 monnum, tá kortini av álvara komu. Hetta gav mær tann møguleikan, at eg skifti teir mans út, sum høvdu fingið gult kort, so hesir ikki eisini skuldu fáa reytt. Men ein av teimum innskiftu fekk so kortini reytt, so hann fái eg ikki brúkt næsta vikuskifti, sigur Allan Mørkøre.

### Heilt galið

Heilt so varin í orðavalinum var liðskiparin hjá AB, Steinbjørn Olsen, ikki. Torbjørn hevur sjálvur dømt, og hann helt, at dømingin leygardagin var undir alt lágmark.

- Hann dømdi hampuliga væl fyri steðgin, men so skjótt, sum seinni hálvleikur byrjaði, gekk heilt galið. Og eg má siga, at eg havi ongan tíð áður upplivað slíkt. Hatta er nakað, sum ikki eigur at koma fyri, segði Steinbjørn Olsen millum annað við Rás2.

Og Steinbjørn legði afturat, at hevði hann dømt sjálvur, vildi hann mett, at hesin dysturin í mesta lagi kostaði seks gul og kanska eitt reytt kort.

Fyri steðgin hevði Rúni Gaardbo bert givið eitt gult kort. Eitt varð givið fyri kjaftaslit, tá menn gingu av vøllinum, og í seinna hálvleiki gjørdist talan um slíkt kortregn, at flísin í miðal varð havd á lofti fyri hvørjar tríggjar minuttir.

Við Rás2 segði Rúni Gaardbo í stuttari viðmerking, at talan í øllum førum var um kort, sum vórðu givin fyri ófantaligt spæl ella kjaftaslit.

---

# Havnin tók stór tøk



*Lagið var í toppi, tá Havnarbáturin streyk fyrstur um málið í 10-mannafarsróðrinum. Og so kundi róðrarfólkið koyra kring høvuðsstaðin í lastbili leygarkvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sigurin hjá Havnarbátinum var krúnan á verkinum hjá Havnar Róðrarfelag, sum umframt 10-mannafara sigurin eisini vann í trimum øðrum kappingum í væl eydnaða kappróðrinum í Vestmanna**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gekk sum eftir ánni at avgreiða kappróðrarnar á Fjarðastevnu í Vestmanna leygardagin.

Barnaróðrarnir vóru væl og virðiliga fingnir frá hondini, áðrenn ásettu tíðina til FM róðrarnar. Á slagnum trý gelti startskotið fyri gentubátunum, og klokkan var ikki farin av hálvgum fimm, tá ið síðsta 10-mannafarið fór um málið.

Líkindini vóru av teimum fagrastu. Heiður himin, lýkka í luftini og stilli. Nú er róðrarárið so mikið gamalt, at rógvararnir og stýrimenninir rættuliga eru komnir í venjing, og tað ger, at uppgávan hjá teimum, sum stíla fyri, verður lættari, enn hon var í fyrstu róðrunum á árinum.

Ein onnur orsøk, til at tað gekk so skjótt og væl, var, at tað ongantíð var neyðugt at flyta fasta startin, tí allir róðrarnir vóru 1000 metrar.

Á aðalfundinum hjá Róðrarsambandinum fyrr í ár var umrøðan av róðrarteinunum enn eina ferð frammi. Tá varð samtykt at seta bólk at viðgera spurningin fyri at lýsa málið og fyri at tosa við róðrarfólk um spurningin.

Málið verður tikið uppaftur seinni. Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at strika 1500 metra málið soleiðis, at tað bara verður róð av 1000 og 2000 metrum.

### Góður dagur hjá HR

Eftir at tað ikki hevur gingið meiri enn passaligt hjá Havnar Róðrarfelag í fleiri ár, hava fyrireikingarnar í felagnum til hetta árið verið góðar, og tað sæst aftur á úrslitunum.

Besta úrslitið higartil í ár rakk Havnar Róðrarfelag í Vestmanna leygardagin. Krúnan á verkinum var tað, at tað aftur eydnaðist Havnarbátinum at vinna. Harvið er tað framvegis stórur spenningur um FM-heitið í kappingini millum 10-mannaførini Havnarbátin og Ormin.

Umframt í kappingini millum 10-mannafør vann Havnar Róðrarfelag eisini dreingja kappingina, kappingina millum 5-mannafør við kvinnum og kappingina millum 5-mannafør við gentum.

Tað er møguleiki fyri, at fleiri FM vinnarar verða funnir, tá tað leygardagin verður kappróður á Vestanstevnu í Miðvági.

8-mannafarið Heiðabáturin og dreingirnir og kvinnurnar við Sílinum hava vunnið allar róðrarnar higartil.